gult cyan magenta svart






# Andstøðan fingið meirilutan

*Varð val hildið nú, hevði Sambandsflokkurin verið størsti flokkur, og andstøðan hevði fingið meirilutan á tingi*

John Johannessen

Teir tríggir andstøðuflokkarnir í dag høvdu, sambært veljarakanningini hjá Fynd, fingið 54 prosent av atkvøðunum og 18 av teimum 32 tinglimunum, um val var nú.

Sambandsflokkurin hevði verið størstur við 26,7 prosentum av atkvøðunum, meðan Javnaðarflokkurin hevði fingið 23,7 prosen og Miðflokkurin hevði fingið 3,5 prosent.

Av samgonguflokkunum hevði Tjóðveldisflokkurin verið størstur. Hann hevði fingið 26,4 prosent av atkvøðunum.

Fólkaflokkurin hevði einans fingið 15,5 prosent av atkvøðunum, meðan Sjálvstýrisflokkurin hevði fingið 4,2 prosent.

### Sambandsflokkurin størstu framgongdina

Størstu framgongdina síðani valið í 1998 hevur Sambandsflokkurin. Talan er um eina framgongd á 8,7 prosent, frá 18 prosentum av atkvøðunum til 26,7 prosent av atkvøðunum.

Hetta úrlist gevur Sambandsflokkinum 9 tinglimir, og er talan tískil um ein vøkstur á heilar tríggjar tinglimir. Sambandsflokkurin hevur nevniliga í verandi støðu 6 umboð á tingi.

Men eisini Tjóðveldisflokkurin er farin nógv fram síðani seinasta val. Hjá honum er talan um eina framgongd á 2,6. Flokkurin fekk nevniliga 23,8 prosent av atkvøðunum til valið á várið í 1998, meðan hann í veljarakanningini fær 26,4 prosent, og sostatt liggur eitt lítið vet aftan fyri Sambandsflokkin.

Hetta úrslit broytir, sambært kanningini, kortini ikki tingmannatal Tjóðveldisfloksins. Flokkurin fær 8 tinglimir, eins og hann hevur í dag.

Triðji og seinasti flokkurin, sum í veljarakanningin fær betur úrslit enn á valinum í 1998 er Javnaðarflokkurin. Hann fær nú 23,7 prosent av samlaðu atkvøðunum. Á valinum í 1998 fekk Javnaðarflokkurin 21,9 prosent av atkvøðunum. Talan er sostætt um eina framgongd á 1,8 prosent.

Hendan framgongdin hjá Javnaðarflokkin hevur við sær, at hann fær ein tinglim meira, enn hann nú hevur. Javnaðarflokkurin er í dag umboðaður av 7 tinglimum, meðan kanningin gevur honum 8 tinglimir.

### Fólkaflokkurin stóra afurgongd

Størstu afturgongdina síðani valið í 1998 hevur Fólkaflokkurin. Hann missir 5,8 prosent av atkvøðunum. Til valið í 1998 fekk hann nevniliga 21,3 prosent av samlaðu atkvøðunum, meðan hann í veljarakanningini einans fær 15,5 prosent av atkvøðunum.

Avleiðingin av hesum er, at Fólkaflokkurin missir tríggjar tiglimir. Hann hevur í dag 8 tinglimir, meðan úrslitið av veljarakanningini einans gevur honum 5 tinglimir.

Tann triðji flokkurin í samgonguni, Sjálvstýrisflokkurin, fær eisini vánaligt úrslit í veljarakanningini. Sjálvstýrisflokkurin fer aftur við 3,5 prosentum samanborið við valið í 1998.

Sjálvstýrisflokkurin fekk á valinum í 1998 7,7 prosent av samlaða atkvøðutalinum. Nýggjasta veljarakanningin gevur honum einans 4,2 prosent.

Avleiðingin av hesum er, at Sjálvstýrisflokkurin missir annan av sínum tveimum tinglimum.

Minsti flokkurin á tingi, Miðflokkurin, fer eisini aftur í veljarakanningini. Men hann varðveitir kortini sína eina tinglim.

Miðflokkurin fer aftur við 0,6 prosentum, frá 4,1 til 3,5 prosent.

### Polarisering

Veljarakanningin sýnir heilt greitt, at Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin hava størstu framgongdina. Hetta meta eygleiðarar vera tekin um áhaldandi polarisering millum veljararnar í sambandi við fullveldismálið.

– Úrslitið bendir á, at veljarar úr ymiskum flokkum, sum eru ivasamir um fullveldisætlanina, venda sær til Sambandsflokkin, og sjálvsstýrissinnaðir veljarar úr ymiskum flokkum venda sær til Tjóðveldisflokkin, siga eygleiðarar, Sosialurin hevur tosað við.






# Tíðin komin at saðla um

*Jóannes Eidesgaard heldur, at veljarakanningin heilt greitt vísir, at veljarin ikki tekur undir við fullveldispolitikki landsstýrissins*



John Johannessen

Heili 62 prosent av føroysku veljarunum halda, sambært nýggjastu veljarakanningini, at tað er best at finna eina loysn á ríkisrættarliga spurninginum, ið liggur innan fyri ríkisfelagsskapin.

Talið av teimum, ið taka undir við, at Føroyar gerast fullveldisríki, um skiftistíðin verður fýra ár, er einans 24 prosent.

### Ongan stuðul hjá fólkinum

Hetta heldur formaður Javnaðarfloksins, Jóannes Eidesgaard, heilt greitt sýnir, at landsstýrið ikki hevur fólkið aftan fyri seg í fullveldismálinum. Tí skiftistíðin verður ikki longur enn fýra ár.

Tí mælir Jóannes Eidesgaard landsstýrinum til at saðla um, so ein loysn kann finnast, ið liggur innan fyri ríkisfelagsskapin. Eina loysn, ið fer at lenda onkustaðni millum Sambandsflokkin og Tjóðveldisflokkin.

### Politiskur trupulleiki hjá løgmanni

Jóannes Eidesgaard mælir ikki beinleiðis landsstýrinum til at leggja frá sær. Hann sigur, at higartil hevur virt, at samgongan er í einari samráðingarstøðu, ið hon skal sleppa at enda, so fólkið kann taka støðu til úrslitið.

Men Jóannes Eidesgaard heldur, at orðini hjá løgmanni í Degi og Viku hóskvøldið prógva, at nú má nakað henda í samgonguni.

Løgmaður ásannaði fyri Sjónvarpinum, at danska stjórnin ikki fer at loyva okkum longri skiftistíð enn fýra ár. Harafturar ásannaði løgmaður eisini, at fullveldismálið í løtuni er koyrt fast.

– Hetta tulki eg, sum at løgmaður ásannar, at tað málið, øll umsitingarliga orkan hevur verið brúkt til seinastu árini, er miseydað, sigur Jóannes Eidesgaard.

Harafturat vísir Jóannes Eidesgaard á, at løgmaður í Degi og Viku segði, at loysnin á málinum liggur onkustaðni ímillum polariseringina millum Tjóðveldisflokkin og Sambandsflokkin.

### Nýval ella nýggj samgonga

Hetta heldur hann merkir, at løgmaður nú ásannar, at tað ikki fer at bera til at fáa undirtøku fyri verandi sáttmálauppskoti.

Men Jóannes Eidesgaard roknar við, at hetta kann gerast ein trupulleiki í samgonguni. Hann roknar nevniliga ikki við, at Tjóðveldisflokkurin fer at ganga við til nakað annað enn verandi sáttmálauppskot.

Tískil roknar Jóannes Eidesgaard við, at einasta loysnin á trupulleikanum hjá løgmanni er, at løgmaður skrivar út nýval ella skipar nýggja samgongu.

# Eingin loysn uttan andstøðuna

*Løgmaður ásannar, at undirtøka ikki fæst fyri fullveldisætlanini, um landsstýrið ikki nærkast andstøðuni*

John Johannessen

Eingin loysn finnst á fullveldismálinum, fyrr enn sáttmálauppskotið er vorðið samansett av hugsanunum hjá øllum flokkunum.

Hetta ásannar løgmaður, efir úrslitið av nýggjastu veljarakanningini, sum varð almannakunngjørd í Sjónvarpinum og í Sosialinum hóskvøldið.

Løgmaður sigur, at veljarakanningin heilt greitt vísir, at vit hava fingið eina politiska polarisatión í sambandi við fullveldismálið. Og eina slíka polarisatión heldur hann vera tað ringasta, ið kann henda fyri fullveldismálið.

Polarisatiónin, løgmaður sipar til, er stóra framgongdin hjá ávikavist Sambandsflokkinum og Tjóðveldisflokkinum.

Men hesa polarisatión ætlar løgmaður at beina burtur. Hann sigur sína uppgávu vera at finna eina loysn, ið kann fáa undirtøku frá føroyska fólkinum. Eydnast tað honum ikki at finna eina slíka loysn, er hann bangin fyri, at vit verða noydd at taka støðu til eitt alternativt uppskot frá dønum.

Fyri at finna loysnina sær løgmaður tað vera neyðugt finna eina loysn, so nógvir flokkar, sum møguligt kunnu taka undir við. Í hesum sambandi sigur løgmaður seg eisini meina við tey markantu á Tjóðveldisveinginum og tey markantu á Sambandsveinginum.

Hesa loysn roknar løgmaður við at finna, men hann vil ikki siga, um hetta bert fer at krevja justeringar í verandi sáttmálauppskoti, ella neyðugt verður við einum nýggjum sáttmálauppskoti. Tó skilt á løgmanni, at talan í fyrstu atløgu ikki verður um nakað nýtt sáttmálauppskot, men heldur um justeringar í verandi uppskoti.

Løgmaður er tískil samdur við Jóannesi Eidesgaard, tá hann sigur, at neyðugt er at endurskoða fullveldisætlanina. Eisini fegnast løgmaður um, at Jóannes Eidesgaard sigur, at málið um ríkisrættarliga spurningin ikki má steðga upp. Tí rættir løgmaður Jóannesi Eidesgaard armin og bjóðar hon vera vælkomnan at finna eina loysn á fullveldismálinum saman við landsstýrinum.

Løgmaður ásannar, at samráðingarnar við donsku stjórnina eru koyrdar fastar, nú tað er greitt, at

# Stjóraskifti á tryggingini




Í dag eru liðin 60 ár, síaðni Samtakið Tryggingarsambandið Føroyar byrjaði virkið sítt. Feløgini í samtakinum vórðu løgd saman frá 1. januar 1998 við heitinum Tryggingarfelagið Føroyar.

Nú felagið hevur rundan føðingardag er eisini stjóraskifti. Forstjórin Jens Peter Arge (hm) fer frá, og Gunnar í Liða tekur við sum forstjóri. Á myndini heilsast fráfarandi og komandi forstjórin

**Mynd Jens K Vang**

hallo...

Sosialurin - 311820

gult cyan magenta svart